# ÓTRÚLIGA LITFAGURT

**Tann 9. mars verður eitt megnaravrik framført í Norðurlandahúsinum. Aftur í ár stendur Studentaskúlin fyri at framføra ein sangleik. Flestu okkara minnast Skeyk og Godspell, og nú koma vit sterkt aftur við leikinum Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið**



Hesin sangleikur varð í 70'unum skrivaður av Andrew Lloyd Webber og Tim Rice. Upprunaheitið er Joseph and The Amazing Technicolor Dreamcoat, og týtt til føroyskt hava Anna Kristin Bæk og Dánial Hoydal.

Søgan er hin vælkenda bíbliusøgan um Jósef, sum av øvundsjúku brøðurs sínar varð seldur sum trælur til Egyptalands, har hann fór ígjøgnum nógv ymiskt og at enda gjørdist hægsti maður Faraos - varafarao. Men eingir hestavagnar og tílíkt verða at síggja, tí leikurin er nútímansgjørdur. Tað eru mest studentaskúla- og HF næmingar, sum eru við í leikinum, men eisini er nógv hjálp komin uttanífrá. Kórið í skúlanum stuðlar nógv undir við sanginum, stjórnað av Zachariasi Sørensen. Heilt fitt av dansarum hava vit eisini, har Jóna Thomsen, sum í Onglandi hevur lisið innanfyri dans, er venjari. Jákup Veyhe er leikstjóri, og Anna Kristen, sum eisini týddi leikin, stendur eisini fyri at gera búnarnar til kórið, leikararnar og dansarnar.

Hesi ungu, evnaríku fólkini venja dúgliga næstan hvønn dag í vikuni og hyggja spent fram ímóti einari framúrskarandi frumframførslu týsdagin 9. mars.

Jóannes Lamhauge fekk orðið á tveir av leikarunum, Høgna Reistrup og René Bischoff.

**Høgni Reistrup, hvør ella hvørjir eru tínir leiklutir í sangleikinum?**

Ja, altso, fyrst og fremst eri eg Siméon, ein av teimum tólv beiggjunum, ið eisini er hin mest lærdi av teimum øllum. Akademikarin, um ein so má siga. Hansara stóri áhugi liggur m.a. í franskari mentan og teimum ymsu egyptisku mosasløgunum.

Eisini skal eg leika ein av lívvakarmonnunum hjá Fárao.

**Men um tú skal leika ein av egyptisku vaktunum hjá Fárao, so inniber tað óivað, at tú skal framføra nærum nakin omanbeltis. Er tað nakað, ið tú stúrir fyri, ella hevur tú kanska roynt tað áður?**

Stúri fyri? Nei, als ikki. Eg havi, sum tú sigur, roynt tað áður. Á jólum var eg t.d. við í einum dreingjabólki, ið æt Hunang 5. Her skuldu vit millum annað vera á palli í berum yvirkroppi. Tó var endamálið við bólkinum kanska fyrst og fremst at hála í smílibondini á fólki, sigur Høgni og smírist.

**Hevur tú annars nakrar sjónleikaraligar royndir, burtursæð frá hesum sangleikinum?**

Ja, fleiri. Eg havi valt mær leiklist, við Jón Thorsteinsyni, sum lærugrein her á studentarskúlanum. Og har hava vit havt nógv jørn í eldinum seinastu tíðina. Vit hava millum annað leikt ein leik hjá Samuel Beckett. Og vit fara í næstum í holt við ein skemtileik, ið kallast "Hvør skal hava ommuna?", so eg vil siga, at eg ikki eri heilt óroyndur sum sjónleikari. Men eg má tó viðmerkja, at eg hóast alt havi ment meg ótrúliga nógv leikliga hesa tíðina, eg havi vant til sangleikin, tí vit hava jú vant so nógv. Nærum hvønn dag frá fyrst í januar. Hetta við SANG-leiki er jú hóast alt eisini spildurnýtt fyri meg.

**Men tú hevur jú spælt og sungið rættuliga nógv í tínari tíð. Vit kunnu m.a. nevna Prix Føroyar, har tú var frontfigurur í bólkinum Lawetz, og so eisini singer/songwriter kappingina, har tú so dyggiliga sang teg inn í finaluna og inn í hjørtuni á áhoyrarunum. So tað tónlistarliga átti í øllum førum at verið í lagi. Men hvussu verður, tá tú nú skal seta tínar tónlistarligu og leiklistarligu dygdir saman í sangleiki?**

Tað er heilt avgjørt ein møtismikil avbjóðing. Men framum alt er hon sera spennandi og markarbrótandi.

**Nú nærkast framførslurnar uppi í Norðurlandahúsinum alsamt, og fólk royna sum vargar at skava undir seg atgongumerki til tær avmarkaðu sýningarnar. Hvat heldur tú um seriøsitetin hjá fyriskiparunum og stigtakarunum, ið fáast við leikin? Samsvarar hann á nakran hátt við hin stóra áhugan hjá fólki?**

Ja, tað ger hann so avgjørt. Eg haldi at seriøsiteturin kring verkætlanina er ógvuliga stórur, og tí havi eg eisini stóra virðing fyri. Tað hevur ótrúliga nógv at siga, at øll eru seriøs hvør á sínum posti, serstakliga tá talan er um eina so stóra og ófatuliga dýra verkætlan. Hetta er jú ein verkætlan í milliónaklassa, ið fíggjast skal, og so eru tað eru jú eisini gott og væl tilsamans 100 sangarar, blásarar, tóleikarar, sjónleikarar, dansarar, listafólk, timburmenn og seymikonur, ið dagliga royna at gera sítt ítasta fyri at fáa endarnar at røkka saman og tingini at rigga. So ein er næstan í tí støðu, at ein ikki torir at gera annað enn at spenna seg út sum frægast. Tað liggur tá eisini eitt eyka stórt trýst á mær og okkum sjónleikarum, ið skulu virka sum hin berandi parturin í verkætlanini.

Nú er stutti steðgurin longu at enda komin, og tropparnir verða aftur biðnir um at savnast til kórvenjingar í kórvenjingarhølinum. Tað sæst, at øll her uppi taka kórsangin í djúpasta álvara, og eg ivist ikki í, at úrslitið uppi í Norðurlandahúsinum fer undir ongum umstøðum at standa aftan fyri forvæntingarnar hjá nøkrum.

Seinni hetta sama kvøldið var eg so mikið heppin, at eg eisini fekk eitt lítið prát við René Bischoff, ið, burtursæð frá at sjálvur vera sjónleikari í sangleikinum, eisini hevur staðið fyri einum fittum parti av fyriskipingararbeiði. T.d. hevur hann sniðgivið og uppsett ta væl umtóktu sangleiksheimasíðuna www.hoydalar.fo/josef og plakatina, ið er at síggja á nærum hvørjum gøtuhorni í Havnini.

**René Bischoff, kanst tú greiða eitt sindur frá tíni serstøku uppgávu handan verkætlanina?**

Ja, sjálvandi. Burtursæð frá at vera leikari havi eg, sum tú sigur, fingið tað álit at evna bæði sangleiksplakatina og heimasíðuna til, og má hetta sigast at hava verið ein avbjóðing hvør í sínum lagi, tí tað hevur jú nógv at siga, hvussu ein skapar reklamu fyri eini so stórari verkætlan sum hesa. Tað skal jú bæði appellera til fólk og siga okkurt í sær sjálvum. Tað krevst til dømis, at plakatin er litrík og fangar eygað á fólki alt fyri eitt, og havi eg til sama endamál roynt so vítt gjørligt at skorið hana til, so at hon verður so einføld sum gjørligt, men samstundis so spennand og forkunnug sum gjørligt. Hitt gylta sniðið er tildømis ein gjøgnumgangandi tráður í bæði plakat og heimasíðu.

**Er hetta so fyrstu ferð tú fæst við tílíkt arbeiði?**

Nei, tað er tað ikki. Eg starvist dagliga sum forritari á Kervinum, og har er uppgávan hjá mær m.a. hetta at gera líknandi forrit og annað innan kunningartøkni og alnót.

**Eg havi skilt á lagnum at hetta er eitt rættuliga stórt mentunartiltak tit eru farin í holr við. Hvussu ber tað til, at ein so stórur táttur verður tikin upp?**

Ja, rætt hevur tú. Hetta er ein risaverkætlan í størsta Broadway lutfalli, ið føroyingar ongantíð hava sæð áður. Tað eru fleiri grunnar, ið standa fyri fíggingini og fyriskipingini.

Tað er kanska, tí at hildið verður, at ov fáir sangleikir verða framførdir á okkara leiðum sum heild, og kanska alt ov lítið av tílíkum stórum sangleikum sum hesum. Tað er jú ikki hvønn dag, at ein Andrew Lloyd Webber/Tim Rice sangleikur verður sýndur á okkara oyggjum.

Ein sjónleikur sum hesin umboðar nevniliga allar aldursbólkar og allar smakkir, um so ber til at siga.

Vit síggja fyrst og fremst bíbilsku søguna um Jósef og dreymakotið, samstundis sum vit hoyra eitt hav av frálíkum tónleikassløgum og temum, gomlum sum nýggjum. Eitt nú kunnu nevnast swing, calypso, rock'n roll, disko, country, og mangt annað. So á ein hátt ber til at siga, at sjónleikurin er tíðarleysur í allar mátar.

Eisini eru goymd fleiri smá loynilig yvirraskilsi, ið verða avdúkað í sangleikinum, ið munnu fara at vekja nógv bilsni ímillum áskoðararnar.

**Til síðst vil eg spyrja, hvørjir tinír leiklutir í sjálvum leikinum eru?**

Mínir leiklutir eru: Gád, ið er ein av beiggjunum hjá Jósefi, tænari hjá Potifár, og Fárao. Hin síðsti leiklutorin hjá mær er eitt av mongu loyndarmálunum, ið eg nevndi áður, og samstundis er hann eitt sindur av kryddinum í sangleikinum, sigur René og blunkar smírin við øðrum eyganum.

**Atgongumerki eru til sølu í Norðurlandahúsinum og í Kunningarstovuni fyri 150 kr stykki.**






VÁRFRAMSÝNINGIN2004

Letur upp í Listaskálanum fríggjadagin 5. mars kl. 16.00

**Á framsýningini sýna 20 málarar, grafikarar og tóvirkisfólk fram umleið 100 nýggj verk**

Tygum eru hjartaliga vælkomin inn á gólvið

Opið er:
Týsdag - fríggjadag kl. 14-17
Leygardag - sunnudag kl. 14-18
Mánadag er ikki opið

FØROYSK MYNDLISTAFÓLK
FØROYSK TÓNASKØLD
LISTASAVN FØROYA



www.travel.fo

Faroe Travel

tel 312600

Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

